

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 03 - 2012

# Kappingin um føroysku arbeiðsmegina

?- skulu vit framleiða arbeiðsmegi til útlandið? Hetta er heitið á árliga fundinum hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag, sum verður hildin í Tofta skúla mikukvøldið klokkan 19. Vinnufundurin verður settur? av Símun Johannesen, borgarstjóra í Nes kommunu. "Føroysk arbeiðsmegi uttanlanda fyrimunir og vansar?" er heitið framløgu hjá Maritu Rasmussen, stjóra í Vinnuhúsinum "Arbeiðsmegi til frálandavinnu" er heitið á evni, sum Hans Jákup Johannesen, stjóri í Faroe Offshore Service fer at viðgera. "Tvískattasáttmálin" er heitið á framløgu hjá Petur Alberg Lamhauge, ráðgeva í Fíggjarmálaráðnum. "FOÍB og hugleiðingar um oljumálið" er heitið á framløgu, sum Jan Müller, stjóri í FOIB fer at halda. Eftir framløgurnar verður kjak. Fundurin er fyri limum í EVF og innbodnum. Men einstaklingar, feløg og virki kunnu gerast limir í felagnum við at venda sær til Rannvá Troest 566603 ella rannva@vrg.fo Mynd - Frá fundartiltaki í Eysturoyar Vinnulívsfelag fyrr í ár, har Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil helt fyrilestur um komandi boring á landgrunninum. Mynd oljan.fo/Jan Müller